MENTAMÁLARÁÐIÐ

| | | |
|---|---|---|
| **Uppskot til rundskriv** | **Dgf.:** 26. januar 2015 | |
| **Til**<br>**skúlar við gymnasialum miðnámsútbúgvingum** | **Máltal:**<br>14/00856 | |
| **Heiti**<br>**Rundskriv um fast próvtøkugrundarlag hjá sjálvlesandi til próvtøkur í gymnasialu miðnámsútbúgvingunum** | | |

Sambært § 69 í undirvísingarkunngerðini og § 8 í próvtøkukunngerðini skal tann, sum ætlar at skriva seg inn sum sjálvlesandi, skjalprógva eitt ítøkiligt próvtøkugrundarlag. Próvtøkugrundarlagið skal hava støði í námsætlanini í tí ávísu lærugreinini.
Sambært § 12 í lógini hevur leiðari útbúgvingarstovnsins námsfrøðiligu ábyrgdina av øllum virkseminum á stovninum mótvegis landsstýrismanninum.

Vísandi til oman fyri nevndu ásetingar verður álagt útbúgvingarstovni at nýta hesa reglu:

> **Leiðari útbúgvingarstovnsins kann áseta eitt og sama próvtøkugrundarlag at galda fyri øll sjálvlesandi í tí ávísu lærugreinini á tí ávísa stignum á tí ávísa stovninum. Hetta fasta próvtøkugrundarlagið skal liggja alment frammi á heimasíðu stovnsins ella í sjálvari tilmeldingarskipanini.**

Viðmerkingar:

Hetta ger, at øll, sum kundu hugsa sær at tikið próvtøku sum sjálvlesandi í ávísari lærugrein á ávísum stigi, hava møguleika at síggja, hvat próvtøkan fakliga snýr seg um. Hetta kemur at spara umsøkjara og lærara tíð og stríð í sambandi við at leita fram og gera próvtøkugrundarlag til fleiri próvtøkur av sama slagi, tí eftir hesu reglu koma allir sjálvlesarar at nýta sama próvtøkugrundarlag í somu lærugrein á sama stigi.

**Mentamálaráðið**

Martin Næs (sign.)
deildarstjóri

/
Sámal í Skorini (sign.)
verkætlanarleiðari